Gøtu Kommuna



# Gøtu kommuna søkir

1 sjúkraavloysara fyri dagrøktararnar, at byrja skjótast til ber.

Dagrøktarheimið skal vera innrættað barnavinarligt, har rúm er til børnini at spæla í og hóskandi trygt spæliøkið uttanfyri.

Í skipanini eru tvær dagrøktarar, ein í Syðrugøtu og ein í Norðragøtu. Vit hava skipað eina spælistovu, har dagrøktarar saman við børnunum og leiðaranum koma saman til ymiskt, ein dag um vikuna frá kl. 7.30 til kl. 12.30. Vit eru í stovuni sum frítíðarskúlin brúkar.

Lønin er sambært sáttmála við Føroya Kommunala arbeiðsgevarafelag.

## Til dagstovnin

søkist ein avloysari fyri pedagog í farloyvi, at byrja 1. august 2002 til 23. desember 2002. Arbeiðið er í frítíðarskúlanum, 30 tímar um vikuna.

1 pedagog og 1 hjálparfólk til barnagarðsstovu, 21 pláss (4-6 ár), bæði størvini eru normeraði 30 tímar um vikuna, at byrja 1. august 2001.

1 sjúkraavloysara at byrja 1. august 2002.

Um eingin pedagogur søkir, verður hjálparfólk sett.

Lønin er sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Torgerð Hansen,t lf. 442012 lokal 10.

Skrivlig umsókn við avritum av prógvum, tilmælum v.m. skal sendast okkum áðrenn mánadagin 17. juni 2002.

Bygdarráðið tekur sær rætt til frítt at velja ímillum umsóknirnar ella ongan at seta.

**Dagstovnurin í Gøtu**
Boks 32
511 Gøtugjógv

# Chooper til sølu



Suzuki Intruder 750 ccm, árg. 91, sær gott út og er væl hildin. Verður seldur, um nóg gott boð fæst.

**Tlf. 421280 - 251293**

Sosialurin -tað loysir seg

# Kvívíkar skúli

## søkir eftir lærara til skúlaárið 2002/2003

Vegna lærara í farloyvi, er eitt tíðaravmarkað starv við Kvívíkar skúla, skúlaárið 2002/2003.

**Førleikakrøv:**
Lærara, ið serliga kann undirvísa í tónleiki, svimjing/fimleik og annars øllum lærugreinum.

**Um skúlan:**
Kvívíkar skúli er ein fýraflokkaður skúli við næmingum frá 1. til 7. árgang. Næmingatalið komandi ár er 51. Fimm lærarar eru við skúlan og kemur tú at vera ein teirra. Skúlin er væl útgjørdur við fimleikarhøll, svimjihyli og telduhøli.

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag í lønarflokki 18.1 til 27.4.

Meir fæst at vita hjá skúlaleiðaranum, Bjarna Heinesen, tlf. 421291 fartlf. 211504.

Umsóknir við prógvi og viðmælum skulu sendast til Kvívíkar Skúlastýrið í seinasta lagi 21. juni 2002 kl. 12.00.

**Skúlastýrið fyri Kvívíkar skúla**
Att: Jan Andreasen
340 Kvívík

HAVSBRÚN

Søkt verður eftir
## framleiðsluleiðara

*Havsbrún er eitt av størstu og tøkniliga mest framkomnu framleiðsluvirkjunum í Føroyum við 90 starvsfólkum og einum umsetningi uppá uml. 400 mill. kr. árliga. Havsbrún framleiðir fiskamjøl- og lýsi á Mjøldeildini, og alifóður á Fóðurdeildini. Størri helmingurin av framleiðsluni fer til útflutnings.*

Vit søkja eftir einum framleiðsluleiðara til Mjøldeildina. Vit kunnu bjóða eitt spennandi arbeiði í einum dynamiskum umhvørvi, har menningin gongur við rúkandi ferð.

**Arbeiðsuppgávur:**
Ábyrgd av framleiðsluni av fiskamjøli og lýsi, herundir ábyrgdina av:
- operatørum og framleiðslustarvsfólkum
- støðugt at optimera framleiðsluna
- at framleiðslutólini eru í góðum standi
- at góðskukrøvini verða hildin
- at menna framleiðslu og góðsku á lidnu vørunum

**Vit rokna við at tú hevur:**
- eina holla tekniska útbúgving
- kunnleika til maskinur og teldur
- góð samstarvsevni

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 24. juni 2002. Vil tú vita meiri, ert tú vælkomin at ringja til okkum ella senda teldupost.

**P/F Havsbrún**
FO-530 Fuglafjørður
Tlf. 414400 • Fax 414401
E-mail: bep@havsbrun.fo

# Pedagogur

## til útibarnagarðin TERNAN

Leirvíkar kommuna søkir eftir pedagogi til útibarnagarð at arbeiða fulla tíð. Byrjað verður eftir summarfrítíðina 12. august 2002.

Dámar tær væl at vera úti í náttúruni og ynskir tú nýggjar avbjóðingar, er hetta kanska nakað fyri teg.

Lønin er samb. sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran á tlf. 443125 ella 215125.

Skrivlig umsókn við avritum av møgulgium prógvum skal verða kommununi í hendi í seinasta lagi mánadagin 17. juni 2002.

Um ongin skikkaður umsøkjari er, verður hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

**Leirvíkar Kommuna**
Postrúm 42
520 Leirvík

Halgir Winther Poulsen, adv.
Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.

vokatskrivstovan r etersensgøta

# SETHÚS til sølu



Sethúsini Óluvugøta 12 verða við hesum lýst til sølu.

Grundøkið er 806 m². Húsini eru totalrenoverað í 1997. Uttanumøkið er gjørt m.a. við tveimum grasvøllum.

Innrættaða gólvvíddin er 222 m² í 2 hæddum og lítil kjallari. Til sethúsini hoyrir bilhús og carportur.

Húsini eru í góðum standi og eru innrættað soleiðis:

Á 1. hædd eru 2 gangir, 1 stórur køkur, 1 grovkøkur, 1 stór stova, 1 wc og 2 verilsir.

Á 2. hædd er ein stór gongd, 4 verilsir og 1 wc.

Stórt ovastaloft, ið er gólvbelagt.

Áhugaðir keyparar kunnu síggja ognina eftir avtalu við undirritaða, sum somuleiðis eisini kann geva fleiri upplýsingar, um hetta ynskist.

Nærri fæst annars at vita við at venda sær til Christian Andreasen, adv.

vokatskrivstovan

Fr. Petersensgøta 9
Postboks 6
110 Tórshavn

Telefon (298) 311145
Telefax (298) 311525
e-mail: advlaw@advlaw.fo.



# Fulltrúi í Vinnumálastýrinum

Eitt starv sum fulltrúi í Vinnumálastýrinum er leyst at søkja

**Høvuðsuppgávur:**
Høvuðsuppgávurnar hjá fulltrúanum eru:
- At ráðgeva landsstýrismanninum og stjóranum
- Gera uppskot til lógir og kunngerðir
- Málsviðgerð
- Kæruviðgerð

**Førleikakrøv:**
Vit hava hugsað okkum, at tú hevur útbúgving sum cand.jur. ella líknandi og hevur góðan kunnleika til edv. Tú skalt eisini duga væl føroyskt og enskt og duga at arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit kunnu bjóða:**
Starvið, sum til tíðir er strævið, er samstundis sera áhugavert við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti úteftir. Vit kunnu bjóða:
- Flex-tíð
- Sjálvstøðugt starv
- Skeið og eftirútbúgvingarmøguleikar

**Løn- og setanartreytir:**
Starvið er lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Búskapar- og Løgfrøðingafelagið. Setanarøkið fevnir um Vinnumálastýrið og stovnar undir tí umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýri.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av prógvum, viðmælum o.ø. skal sendast til:

**Vinnumálastýrið**
**Postboks 377**
**110 Tórshavn**

innan 1. juli 2002.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Arna Poulsen á tel 356060.

team85

V I N N U M Á L A S T Ý R I Ð

HYDREMA



**Vit hava hesar HYDREMA maskinur á goymslu:**

**Rennugravari 906** **kr. 448.000,- u.mvg.**
frá 1992, 4780 tímar, klárgjørdur og málaður hjá Hydrema.

**Rennugravari 808 m.m.** **kr. 298.000,- u.mvg.**
frá 1988, 8000 t. (motorur 1500 t.) klárgjørdur og málaður hjá Hydrema.

**Rei skapsberi 900, demo/nýggjur** **kr. 992.000,- u.mvg.**

**Multidumpari 912, nýggjur** **kr. 716.000,- u.mvg.**

**Gravimaskina R800 9 t. nýggj** **kr. 669.000,- u.mvg.**

P/F ALMA *Maskinverkstaður & Smiðja*

**Tlf.: 31 58 90 - Fax: 31 04 68 - T-postur: alma@alma.fo**

# Almannastovan

Jónas Broncksgøta 27 – Postrúm 3096
Tlf. 315480 – Telefax 318850
FO-110 Tórshavn

# Sosialráðgevi

**Eitt starv sum sjúku- og barnsburðaravloysari fyri sosialráðgeva við tænastu á økisdeildini í Eysturoy er leyst at seta sum skjótast og inntil 15. februar 2003.**

**Arbeiðsuppgávur:**
- ráðgeva og vegleiða borgarum um rættindi og skyldur í sambandi við almannaspurningar
- seta í verk fyriskipanir sambært forsogarlógini
- ráðgeva barnaverndarnevndum
- seta í verk fyriskipanir smb. barnaforsorgarlógini í samstarvi við barnaverndarnevndirnar
- gera tilráðingar í smb. við umsóknir um fyritíðarpensjónir
- annað

**Útbúgvingarkrøv og royndir:**
- sosialráðgevaraútbúgving
- royndir innan almenna fyrisiting
- góður kunnleiki til EDV á brúkarastøði
- góður málburður í føroyskum, bæði munnliga og skrivliga

**Um deildina:**
Arbeiðsøkið hjá økisdeildini er ráðgeving og vegleiðing í persónligum og forsorgarligum spurningum, og stoðutakan til og fyriskipan og avgreiðsla av veitingum og tiltøkum smb. forsorgar- og barnaforsorgarlógunum.

Á deildini arbeiða 8 fólk.

**Lønar- og setanartreytir:**
Setanar- og lønarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið í bólki 5.

Nærri upplýsingarr um starvið fáast við at venda sær til Egil Olsen, deildarleiðara, á tlf. 448260.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av prógvum o. ø. skulu sendast til:

**Almannastovuna**
Postsmoga 3096
110 Tórshavn

**Umsóknarfreist: 21. juni 2002, kl. 12.00**
Vinarliga merki brævbjálvan »Sosialráðgevi Eysturoy«.

Toll- og Skattstova Føroya

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum.

Uppgávur stovnsins eru m.a. at fyrisita
- skattalógina
- tolllógina
- mvg-lógina
- kolvetnisskattalógina
- avgjaldslógirnar,

eins og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økiskrivstovurnar røkja raksturin.

www.tollskatt.fo
tollskatt@tollskatt.fo

## Frá Toll- og Skattstovu Føroya

Fritíðargrunnurin, Trygdargrunnurin og Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin eru nú fluttir til Suðuroynna.

Grunnarnir verða umsitnir av Toll- og Skattstovu Føroya, Suðuroyar Øki, og halda til á Økisskrivstovuni á Tvøroyri.

Telefon- og avgreiðslutíð er:

| | |
|---|---|
| mánadag – friggjadag: | kl. 09.00 – 15.00 |
| hósdag tó: | kl. 09.00 – 17.30 |
| Telefon: | 37 10 51 |

**Argir, 4. juni 2002**
**Toll- og Skattstova Føroya**